# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Sjúkrarøktarfrøðingar til G1 (Bráðfeingisdeildin)

Søkt verður eftir fýra sjúkrarøktarfrøðingum til fast starv á G1 á starvsbrøki 0,7 í skiftandi vaktum frá 1. februar 2007 ella skjótast gjørligt.

Eisini verður søkt eftir avloysarum í ymiskum starvsbrøkum eftir avtalu til at byrja skjótast gjørligt.

Deildin er ein heild við fleiri ymiskum funktiónum, sum umfata intensiva deild (5 seingjarpláss), dagskurð (4 seingjarpláss), viðrakning (5 seingjarpláss) og pláss til skaðastovu og bráðfeingis móttøku. Arbeiðsuppgávan í høvuðsheitum er røkt og viðgerð.

**Vit kunnu bjóða**
- góða innleiðslu
- skipaða upplæring
- fjølbroytt arbeiði - avbjóðingar
- starvsfelagar, við góðum fakligum førleikum í mennandi umhvørvi
- ein spennandi arbeiðsdag við góðum møguleika fyri egnari menning

**Krøv til umsøkjarar**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga í røkt og viðgerð av sjúklingum við intensivum og bráðfeingis tørvi
- hevur medferðarkenslu og kann skjótt skapa tær yvirlit
- kunna arbeiða sjálvstøðugt og kreativt
- ynskir fakliga menning og avbjóðing innan sjúkrarøktina
- fleksibul og hevur góð samstarvsevni - opin og jalig/ur
- telduførleika
- dugir lættliga at fáa ein konstruktivan dialog og tilknýti til sjúklingar og avvarðandi

**Fyrimun hava umsøkjarar, sum hava**
- fakligar royndir at viðgera og røkta sjúklingar við intensivum og bráðfeingis tørvi
- minst 2 ára royndir á medisinskari og/ella kirurgiskari seingjardeild
- intensiva eftirútbúgving, aðra viðkomandi eftir-, víðari- ella serútbúgving

Lønar- og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Margit Stórá, virkandi deildarleiðara á G1, telefon 304500, lokal 5811, t-postur mast@lsh.fo ella til Nainu Túgvustein, virk. leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 5102, t-postur naina@lsh.fo

Umsóknarfreistin er 5. januar 2007 kl.12.00

## Sjúkrarøktarfrøðingar til Økispykiatriina í Suðuroy

Søkt verður eftir 2 sjúkrarøktarfrøðingum á starvsbrøki 0,75 frá 1. februar 2007.

Starvsábyrgdin er Økispsykiatriin á Psykiatriska deplinum. Arbeiðsøkið er Suðuroyggin, skrivstova verður á Tvøroyri, har sjúkrarøktarfrøðingarnir í Heimatænastuni halda til.
Arbeitt verður í tøttum samstarvi við relevantar stovnar í Suðuroy og Depilstoymið í Tórshavn.

**Førleikakrøv**
- Góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- Royndir innan psykiatri
- Viðkomandi eftirútbúgving er ein fyrimunur
- Teldukunnleiki
- Nýhugsan og kreativitetur innan trupulleikaloysn
- Skal kunna arbeiða sjálvstøðugt og framhyggjandi
- Góð samstarvsevni

**Starvið umfatar**
- Verða við at uppbyggja økispsykiatri í Suðurouy
- Bólka- og individuella samtaluterapi til brúkarar og avvarðandi
- Uppfylgjandi og uppsøkjandi arbeiði
- Verða málgagnið hjá brúkarum við sálarligum breki
- Verða við at uppbyggja gott samstarv við relevantar samstarvspartar

**Vit bjóða**
- Eitt spennandi arbeiði við nógvum avbjóðingum
- Skeið/eftirútbúgving innan- og uttanhýsis, sum Psyk. depilin/økispsykiatriin skipa fyri

Løn- og setunartreytir eftir sáttmála millum Felagið Føroyskar Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið. (viðmerkjast skal, at lønarsamráðingar eru í gongd)

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Ænu Reinert, deildarleiðari, telefon 304500 lokal 4170, t-post: ana.reinert@lsh.fo ella til Bergit Weihe, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, telefon 304500, lokal 4102 t-post: bergitw@lsh.fo

Umsóknarfreistin er 8. januar 2007 kl.12.00

## Sjúkrarøktarfrøðingar til A2 (avloysarastørv)

Á føðideildini eru trý avloysarastørv á starvsbrøki 0,7 í blandaðum vaktum leys at søkja til setan 1. februar til og við 31. august 2007.

Deildin er spennandi við nógvum avbjóðingum, tvørfakligum samstarvi, undirvísing og skipaða innleiðsluætlan. Á deildini eru royndir og virknir starvsfelagar.

**Førleikakrøv**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- góð samstarvsevni
- fleksibul og kreativ/ur
- hug til tvørfakligt samstarv

Fyrimun hava umsøkjarir við royndum innan neonatalogi

Løn og setanartreytir smb. sáttmála millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Annu Helenu Danielsen, 1. assistent, telefon 304500, lokal 5002 ella til Nainu Túgvustein, virk. leiðandi sjúkrarøktar-frøðing, lokal 5102 ella t-post naina@lsh.fo

Umsóknarfreistin er 8. januar 2007 kl 12.00.

## Læknaskrivari

Á Skurðdeplinum er eitt starv sum lækna-skrivari ¾ tíð leyst at søkja til setan 1. februar 2007 ella eftir avtalu. Hetta er eitt nýupprættað starv við høvuðsuppgávum á skurðdeildini.

Sum tann fyrsti læknaskrivari við hesari funktión hevur tú stóran møguleika at seta tína ávirkan á gerandisdagin. Tú verður eisini ein partur av einum toymi av skrivarum, ið til tíðir fara at skiftast um at hava ymiskar funktiónir á skurðdeildini og á skrivaragongini. Á skurðdeplinum eru 14 skrivarar.

**Førleikakrøv**
- útbúgving sum læknaskrivari
- tænastusinni
- dugir at raðfesta arbeiðið, sum til tíðir er krevjandi
- góð samstarvsevni
- góður røkjuskapur
- teldukunnleiki
- fyrikomandi og
- fleksibul

Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Helenu Gerfort, leiðandi læknaskrivara, telefon 304500, lokal 5105.

Umsóknarfreistin er 19. januar 2007 kl. 12.00.

## Onnur størv

**Deildarleiðari til B7**
Umsóknarfreistin er 4. januar 2007, sí meira á www.lsh.fo

**Sjúkrarøktarfrøðingar til B8**
Umsóknarfreistin er 3. januar 2007, sí meira á www.lsh.fo

**Sjúkrarøktarfrøðingar til E3/E2**
Umsóknarfreistin er 3. januar 2007, sí meira á www.lsh.fo

**Sjúkrarøktarfrøðingur til B6**
Umsóknarfreistin er 3. januar 2007, sí meira á www.lsh.fo

**Sjúkrarøktarfrøðingur til B5**
Umsóknarfreistin er 3. januar 2007, sí meira á www.lsh.fo

Tað er umsøkjarans ábyrgd, at umsóknin er á Lønar- og starvsfólkadeildini áðrenn freistin er úti. Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skulu sendast til:

**Landssjúkrahúsið, Lønar og starvsfólkadeildin, FO 100 Tórshavn**







LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

Landssjúkrahúsið er meginsjúkrahús Føroya við umleið 20 serlæknaøkjum og 200 seingja-plássum. Tilsamans starvast yvir 800 fólk á Landssjúkrahúsinum, og endamál okkara er at bjóða føroyingum eina góða heilsutænastu á so nógvum økjum sum gjørligt.

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo